


*Gongst sum ætlað skal nýtt risa-stadion byggjast í Ørestad. Todi Jónsson er ein av stig-takarunum til ætlanina, sum skal kunna hýsa øllum landsmonnum hansara, gerst tað neyðugt*

# Byggja stadion til 50.000 fólk

**Gongst sum ætlað, verður FC Amager partur av risastórari stadion-ætlan á Amager. Nýggj multiarena við 50.000 sitiplássum er nú í umbúna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Líka síðani Todi Jónsson saman við øðrum íleggjarum keypti sær ræði á Fremad Amager, sum nú er partur av FC Amager, hevur verið tosað um at byggja nýtt stadion á donsku høvuðsstaðaroynni.

Fyri nøkrum mánaðum síðani eydnaðist eisini at seta Brian Mollerup í stjórastólin í nýggja felagnum, og nú tykist veruligt kjørt vera komið upp á ætlanirnar.

Berlingske Tidende skrivar í morgun, at nýggja felagið hevur í umbúna at byggja eina sonevnda multi-arena við 50.000 sitiplássum úti á Amager. Enn er einki upplýst um kostnaðin av ætlanini, men Kommunan í Keypmannahavn hevur sagt, at teir vilja veita eitt stuðulslán upp á 200 milliónir sum part av figginginin. Og í september skal avgerð ætlandi takast um, hvør verkætlan skal fáa stuðulslánið.

Todi Jónsson, stjóri í FC Amager, sigur seg illa kunna gera nakrar ítøkiligar viðmerkingar til ætlanina, men hann sigur, at tey avgjørt vóna at gerast partur av ætlanini.

- 50.000 fólk er ikki akkurát tað, sum vit síggja fyri okkum í FC Amager her og nú. Men vónandi kunnu vit fáa fleiri fólk inn til dystir í framtíðini, so hvørt sum felagið veksur.

- Men tað er greitt, at FC Amager einsamalt ikki hevur nakran møguleika at bera eina slíka ætlan. Tað er eisini tí, at hetta eitur multi-arena. Tað fevnir rættiliga breitt, og tí er talan um hópin av øðrum tiltøkum, sum ætlandi skulu hýsast har, uttan at eg tó fái sagt ítøkiliga, hvørji onnur tiltøk talan kann verða um, sigur Todi Jónsson.

Sum skilst, so eru tað fleiri, sum eru boðið at fáa atgongd til tær 200 milliónirnar. Verður tað tykkara projekt, sum fær endaligu góðkenningina. Fara tit so alt fyri eitt víðari í tykkara ætlanum?

- Tað er ætlanin. Nú hava vit arbeitt rættiliga intenst við hesum seinastu tíðina, so sjálvandi vóna vit, at vit nú veruliga kunnu seta turbo á arbeiðið, sigur Todi Jónsson.

# Kristina Háfoss takkar fyri seg

**Rás2 kundi, sum fyrsti miðil, bera tíðindini um, at mentamálaráðharrin, Kristina Háfoss leggur frá sær í dag**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Kristina Háfoss hevur lagt frá sær eftir bert sjey mánaðum sum mentamálaráðharri*

Tað eru persónligar orsøkir sum gera, at eg havi tikið avgerð um at leggja frá mær summentamálaráðharri, sigur Kristina Háfoss.

Hon kunnaði starvsfólkini um avgerð sína klokkan eitt í dag, og klokkan tvey varð so almannakunngjørt, at hon leggur frá sær.

Øll tingmanningin og landsstýrismanningin í Tjóðveldinum helt fyrrapartin fund um málið, men einki var avgjørt, tá blaðið fór til prentingar.

Vit fara at halda okkum frá at gita, um tað eru aðrar orsøkir enn tær persónligu, sum ávrika avgerðina hjá Kristinu Háfoss, men tað er eingin loyna, at tað hava verið trupulleikar í Mentamálaráðnum. Fyri kortum fór aðalstjórin, Petur Petersen, frá, og bleiv fluttur í Løgmannskrivstovuna í Tinganesi.

Tað hevur annars verið ein stórur gjøgnumtrekkur av mentamálaráðharrum, serliga hjá Tjóðveldi hesi seinastu árini, sum talvan eisini vísir.

Enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvør tekur við eftir Kristinu Háfoss.

## FAKTA

**um mentamálaráðharrar síðani 15. mai í 1998:**

| | |
|---|---|
| 04.02.08 - 28.08.08 | Kristina Háfoss |
| 03.02.04 - 04.08.08 | Jógvan á Lakjuni |
| 05.12.03 - 03.02.04 | Annfinn Kalsberg |
| 17.09.03 - 05.12.03 | Annita á Fríðriksmørk |
| 06.04.03 - 17.09.03 | Høgni Hoydal |
| 04.04.03 - 06.04.03 | Annfinn Kallsberg |
| 06.06.02 - 04.04.03 | Annlis Bjarkhamar |
| 14.06.01 - 06.06.02 | Óli Holm |
| 21.07.00 - 14.06.01 | Tórbjørn Jacobsen |
| 28.03.00 - 21.07.00 | Høgni Hoydal |
| 15.05.98 - 28.03.00 | Signar á Brúnni |